

www.oljan.fo

**Jan Müller** 03 - 01 - 2012

# BP gevur Halliburton skyldina

Bretski oljurisin British Petroleum leggur nú sak ímóti amerikanska veitingarfelagnum Halliburton við einum kravi upp á góðar 100 milliardir krónur. BP vil vera við, at tað var Halliburton, sum hevði skyldina av vanlukkuni í Meksikoflógva í fjør, tá ein spreinging umborð á pallinum Deepwater Horizon kostaði ellivu mannalív og elvdi til eina ovurstóra oljudálking. Eftir kravi frá amerikonsku myndugleikunum hevur BP stovnað ein grunn við meiri enn 100 milliardum krónum til at standa ímóti krøvunum frá fiskivinnuni, ferðavinnuni og øðrum, sum hava reist stór endurgjaldskrøv orsakað av dálkingini. Men BP vil ikki standa eftir við ábyrgdini. Sambært Bloomberg News heldur bretska felagið, at Halliburton brúkti ov vánaligt sement, tá felagið royndi at tetta boriholið aftan á spreingingina, og tí vil BP hava amerikanska felagið at gjalda. Í málum um onnur endurgjaldskrøv, sum eru komin fyrr, hava BP, Halliburton og Transocean, sum var operatørur á leiðini, skyldað upp á hvør annan.